


– 0,0 alkohol í blóðinum er eitt krav. Tá vit fingu heiðurin sum heimsins besta metro í fjør, skáláðu vit við alkoholfríari sjampagnu, sigur Suni Skylv Reinert

MYNDIR: RÓLANT WAAG DAM

bannað! Jólafrokostar halda vit altíð á matstovum ella hotellum kring í býnum, og tá vit fingu heiðurin sum heimsins besta metro í fjør, skáláðu vit við alkoholfríari sjampagnu, sigur Suni Skylv Reinert.

Komin til arbeiðis fáa starvsfólkini eina stutta frágreiðing um, hvussu støðan er og so er annars bara at fara til verka. Hjá Suna merkir tað, at hann setir seg við borðið, har tíggju telduskíggjar eru. Her eygleiðir hann so, hvussu metrotokini skikka sær og flyta seg í mun til hvørt annað, umframt at hann eisini hevur eyguni við tí, sum fyriferst á støðunum.

Hendir eitthvørt við tokunum, fer ein alarmur í gongd á skrivstovuni. Við øðrum orðum gerast Suni og teir beinanvegin varugir við tað, eisini hóast eyguni kanska eru á einum øðrum skermi.

– Ofta kunnu vit staðfesta og loysa trupulleikan umvegis upptøkutólini og teldurnar. Eydnast tað ikki, senda vit fólk á staðið, greiðir Suni frá.

Metrotokini í Keypmannahavn eru teldustýrd, so har er eingin førari. Steðgar eitt tok, so steðga øll á sama spori. Við øðrum orðum ber tað ikki til, at tvey tok renna saman. Hesum syrgir telduskipanin fyri. Fjarstøðan millum tokini skal vera longri enn eitt vist. Er hon ikki tað, steðgar tokið og fer ikki víðari fyrr enn fjarstøðan er komin í rætt lag aftur.

## Trygdin í hásæti

Bæði toksporini og sjálv metrotokini, eru eisini ógvuliga følin. Liggur eitthvørt á sporinum, so steðgar toki. Hetta kann vera ein avís, sum er fokin á sporið ella ein fuglur, sum pikkar í eitt pitsastykki, onkur hevur tveitt á sporið. Tað kann tað tykjast høpisleyst, at tokið steðgar fyri slíkum.

Suni vísir tó á, at trygdin skal vera í lagi.

– Har skal ikki vera nakar ivi. Eingin! Í slíkum førum er tað tó hent, at vit kunnu kanna málið við okkara upptøkutólum og siga, at tokið skal koyra víðari. Henda skipanin tryggjar eisini, at tað er so at siga ógjørligt at leypa út fyri eitt tok, um onkur ynskir at gera av við seg, tí tað steðgar í somu løtu okkurt óregluligt er á sporunum, greiðir Suni frá.




Metrotokini í Keypmannahavn eru teldustýrd, so har er eingin førari. Steðgar eitt tok, so steðga øll á sama spori

Tíbetur kemur tað næstan ikki fyri, at fólk leypa út fyri metrotok. Hinvegin hendir tað seg meiri enn so, at eitt tok steðgar av øðrum orsøkum. Eydnast tað ikki, at loysa trupulleikan beinanvegin, er uppgávan hjá Suna og teimum, at fáa hini tokini aftur í gongd.

– Tokið, sum steðgaði, royna vit sjálvandi at fáa í gongd skjótast gjørligt. Men viðhvørt tekur tað eitt sindur av tí, og tá hava vit so eisini eina uppgávu í at fáa restina av tokunum í gongd aftur. Tá gera vit tað, vit venda hinum tokum og syrgja fyri, at tey koyra millum endastøðina og støðina, sum er áðrenn har hitt tokið stendur, sigur Suni.

## Herverk og bumbuhóttanir

Tíverri eru eisini onnur ting enn fuglar og avísir, sum órógva arbeiðsdagin hjá Suna og starvsfeløgunum. Nógv herverk verður framt á metrotokini. Serliga grafitimálarar eru herviligir.

– Hesir kunnu finna upp á at steðga tokini við neyðbremsunum umborð, og so mála tokið frá enda í annan, samstundis sum teir vita av, at vit síggja teir við upptøkutólunum. Tveir minuttir seinni er tokið ikki til at kenna aftur, og allir eru horvnir, greiðir Suni frá.

Tokini, sum verða málað ella rakt av øðrum herverki, verða tikin út skipanini beinanvegin og eitt annað sett í staðin. Áðrenn tokin verða fingin í stand aftur, verða tey avmyndað. Tað vísir seg nevniliga, at tað ofta eru somu fólkini, sum gera herverk.

– Tað er forargiligt við slíkum, men nøkur kunnu ikki bara sær. Tíbetur hendir tað seg viðhvørt, at onkur verður fangaður. Herfyri fekk ein grafitimálari eina bót á fleiri hundraðtúsund krónur, tí hansara signatur var síggja á nógvum tokum, vit høvdu avmyndað, fortelur Suni, sum verður nakað álvarsamari á málinum, tá hann skal greiða frá einum øðrum, sum tíbetur ikki hendir ofta, men kortini er ein veruleiki, hann og hinir á Metromiðstøðini á Amager mugu fyrihalda seg til.

– Tað hendir seg, tíverri, viðhvørt, at bumbuhóttanir koma. Tá er tað løgreglan, sum hevur fingið frænir av onkrum og berir okkum boðini víðari. Oftast er tað hóttanir um at spreingja støðina á Nørreport. Tíbetur er einki hent enn, men hóttanir sum hesar eru tíverri ein partur av arbeiði okkara og eisini gerandisdegnum hjá nógvum danum, sigur Suni, sum ikki er einasti føroyingurin, sum hevur við metroinar at gera.

## Fleri føroyingar

Tvær føroyskar kvinnur arbeiða nevniliga úti á støðunum við at hjápa og leiðbeina fólkum, umframt at tryggja, at fólk hava ferðaseðil. Og tá tað kemur til viðlíkahald av tokunum, er ein føroyingur eisini at finna millum teirra, sum standa fyri hesum.

Men hóast nakrir føroyingar sostatt eru við til at reka metroina í danska høvuðsstaðnum, eru tað lítið í mun til talið av føroyingum, sum ferðast við metroini dagliga. Um onkur teirra hevur gjørt annað, á metrostøðunum ella tokunum, sigur søgan tó einki um.

## FAKTA:

**Suni Skylv Reinert**
er 39 ára gamal og býr á Frederiksberg í Keypmannahavn. Hann er havnamaður um ein háls, men fluttið til Danmarkar fyri 18 árum síðani, har hann í høvuðsheitum hevur bú síðani. Suni hevur nomið sær skrivstovulæru og hevur virkað sum bókhaldari hjá donsku løgregluni, umframt at hann er kendur sum náttklubbaeigari – bæði í Føroyum og Danmark.